


Graham Stewart, stjóri í Faroe Petroleum.

# Faroe Petroleum setur borin í á Norðhavinum

**Jógvan Hugo Gardar**

23.09.2015 - 11:31

Oljan.fo

Faroe Petroleum boðar í morgun frá at byrja verður at bora á sokallaðu Blink-ætlanini á Norðhavinum. Hetta er ein partur av Pil og Bue-ætlanini, ið er ein av mest spennandi nýggju økjunum á norska landgrunninum. Tað er Transocean Arctic sum skal bora brunnin.

Faroe Petroleum eigur 25 prosent av Blink-loyvinum, ið ikki liggur langt frá Njord-ætlanini, ið longu framleiðir kolvetni. Faroe Petroleum eigur 7,5 prosent í Njord.

Blink.brunnurin liggur á 360 metra dýpi. Feløgini sum eru við í ætlanini eru VNG Norge, sum er fyristøðufelag við 30 prosent av loyvinum, Spike Exploration við 30 prosentum, Faroe Petroleum við 25 prosentum og Pure E&P Norge við 15 prosentum.

Graham Stewart, stjóri í Faroe Petroleum, sigur í eini viðmerking at hann er nøgdur við at teir nú fara undir hesa boringina, ið er ein avleiðing av tí Boomerang-fundinum sum bleiv almannakunngjørt í farnu viku.

Hann leggur afturat at hendan leitingin á hesi leiðinier sera spennandi fyri Faroe Petroleum, og kann vera við til at økja munandi um virðini í felagnum framyvir.